## Helgi L. Petersen til ÍF

Fuglfirðingar hava styrkt um hópin fyri restina av hesum kappingarárinum. Í fjør var Helgi L. Petersen ein týðandi lutur í stríðnum hjá ÍF at vinna sær uppflyting, men hann metti ikki, at stundir vóru til Formula-fótbólt í ár. Ístaðin hevur hann hugnað sær í 2. deild, har hann hevur spælt við Fram, men nú metir Helgi sjálvur, at hann hevur hug til meira enn tað. Helgi vandi í gjárkvøldi við ÍF, og ætlandi verður hann í hópinum, sum um vikuskiftið skal royna seg móti EB/Streymi.



## KÍ kvinnur skulu til Litava

Lutakastið til UEFA Cup kappingina hjá kvinnum sendi KÍ til Litava at spæla innleiðandi bólkaspæl. KÍ kom í bólk saman við Zvezda-2005 úr Russlandi, 1. FC Femina Budapest úr Ungarn og Gintra Universitetas úr Litava, sum verða vertir fyri bólkaspælinum. Kappingin hjá KÍ kvinnum verður í døgunum frá 4. til 9. september. Øll liðini spæla ímóti hvørjum øðrum, og liðið, sum vinnur bólkaspælið, fer víðari í kappingini. Hetta er áttanda árið á rað, at KÍ kvinnur taka lut í UEFA Cup fyri kvinnur.

KÍ-B36:

# Styrkt árstalsfelag til Klaksvíkar

**Í B36 vóna tey, at bæði Sam Malson og Súni Olsen eru við, tá teir fara at takast við KÍ í Klaksvík**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá vit hóskvøldið frættu úr B36-leguni, var framvegis ikki heilt greitt, hvussu gekst við at fáa seinastu undirskriftirnar upp á pláss.

Men vónin var avgjørt, at bæði enski Sam Malson og føroyski Súni Olsen skuldu hava øll pappír og loyvi í lagi, áðrenn fríggjadagurin var lokin. Og eisini er Johan V. Gunnarsson nú aftur tøkur, eftir at spæliloyvið hjá honum hevur verið í danska Køge í vár.

Og tað er uttan iva góður styrkur hjá B36. Hinvegin er hópurin nú uttan Karoly Potemkin, sum fyrr í vikuni fekk sekkin í felagnum, og heldur ikki er Tamas Nagy við hesaferð. Hann er leikbannaður til dystin í Klaksvík, og í løtuni er hann uttanlands.

Hjá KÍ er talan eisini um styrk. Páll Klettskarð hevur hetta seinasta árið skotið hópin av málum fyri unglingaliðið hjá Fremad Amager, og hann hevur tikið spæliloyvið við sær, nú hann er heima í summarfrí.

Hartil er Kristian á Lakjuni nú aftur tøkur eftir skaða, meðan Bjarni Jørgensen neyvan er til reiðar at spæla, hóast hann er byrjaður at venja aftur. John Hammer er eisini á skaðalistanum hjá KÍ, og hann verður so ikki tøkur.



*Í B36 vóna tey, at Súni Olsen verður við í hópinum sunnudagin*
*savnsmynd*

HB – B68:

# Skulu reisa seg

**Bæði HB og B68 taptu óvæntað seinasta umfar, men nú ætla tey aftur á rætta kós**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*

HB er fullmannað, soleiðis sæð. Ólavur í Ólavsstovu er tøkur aftur, eftir at hann fór út við heilaskjálvta herfyri, og hevur sitið nakrar dystir uttanfyri. Hann hevur verið einasti leikarin, sum hevur sitið uttanfyri og tískil er HB-liðið rokna at vera fullmannað. Hinvegin er tað einki dulsmál, at Tróndur Vatnhamar er misnøgdur við at vera avsettur, og grundgevingina hann hevur fingið, kann hann ikki góðtaka, segði hann við Sosialin í gjár. Tískil er tað ikki óvæntað, um navn hansara ikki stendur á dómaraseðlinum sunnudagin.

### Jákup fór ikki

Tað var undir dystinum mikukvøldið, at misnøgd hansara kom til sjóndar. Tað skrivaðu vit eisini um í hósdagsblaðið okkara. Eitt annað vit skrivaðu var, at Jákup á Borg eisini tóktist at vera misnøgdur. Hann varð útskiftur stutt fyri leiklok, og rýmdi av vøllinum áðrenn dysturin var av, skrivaðu vit. Hetta var tó ikki rætt! Jákup á Borg varð tikin út, men stóð við útskiftaraskýlið til Lars Müller hevði bríkslað dystin av. Vit harmast um mistakið, og biðja lesaran og Jákup á Borg halda okkum til góðar.

### Bymar er farin

Ein leikari sum fór beint av vøllinum og niðan í umklæðingarrúmið, eftir at hann varð skiftur út seinasta umfar, er danin Jacob Bymar. Danin var sjónliga misnøgdur, tá hann varð tikin út í sínum seinasta dysti fyri B68. Hann megnaði ongantíð at fáa bóltin í netið, sum hann annars var ætlaður til, og nú er hann so ikki partur av B68-hópinum longur.

Harafturímóti er Jóhan Dávur Højgaard við aftur, eftir at hann spældi 1. deildar fótbólt farna vikuskiftið. Tað kemur væl við á Toftum. Enn betur hevði tað verið, um veteranurin Øssur Hansen gjørdist tøkur. Hetta vóna tey á Toftum, hóast tey úr B68-leguni meta tað at vera ivasamt, um tað letur seg gera.

### Tveir sigrar á muni

B68 er uppflytari í deildini, og harvið eisini niðurflytingarkandidatur. HB er toppliðið og kappast um meistaraheitið. Kortini hevur høvuðsstaðarfelagið bara vunnið tveir fleiri dystir enn uppflytararnir. Henda mun ynskja havnarmenn at økja, meðan uppflytararnir royna at minka um hann.

NSÍ-Víkingur:

# NSÍ komið ígongd

**Meistararnir hava veruliga fingið glið á seinastu umførini, og teir ætla sær enn trý stig, nú eysturoyaruppgerð er á skránni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir eina rættiliga laka byrjan upp á kappingarárið hevur NSÍ veruliga fingið fótin fyri seg seinastu umførini. Á stigatalvuni er talan nú um annaðpláss, og hetta vilja teir gulu og svørtu fegnir styrkja um vikuskiftið.

Og fortreytirnar skuldu verið til staðar, tí runavíkingar hava í løtuni allar mans tøkar.

Tað hava teir hjá Víkingi hinvegin ikki. Kaj Ennigarð fekk í vikuni heilaskjálvta undir venjing, og hann er neyvan tøkur. Sølvi Vatnhamar breyt armin, tá Víkingur vann á EB/Streymi í miðvikuni, og Sverri Jacobsen hevur ein knæskaða, sum helst heldur honum til summarsteðgurin er av. Og hartil er Magnus Skorðalíð eisini leikbannaður.

Og so er spurningurin annars, um víkingarnir hesa ferð eru til reiðar at spæla væl tveir dystir á rað. Nakað sum hevur verið sera trupult hjá teimum higar til í ár.

**Formula-deildin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | EB/S | 13 | 10 | - | 2 | - | 1 | 29 | 13 | 16 | 32 |
| 2 | NSÍ | 13 | 7 | - | 3 | - | 3 | 21 | 14 | 7 | 24 |
| 3 | HB | 13 | 6 | - | 4 | - | 3 | 24 | 11 | 13 | 22 |
| 4 | B36 | 13 | 5 | - | 6 | - | 2 | 16 | 9 | 7 | 21 |
| 5 | Víkingur | 13 | 5 | - | 3 | - | 5 | 20 | 15 | 5 | 18 |
| 6 | KÍ | 13 | 3 | - | 5 | - | 5 | 16 | 22 | -6 | 14 |
| 7 | ÍF | 13 | 4 | - | 2 | - | 7 | 16 | 25 | -9 | 14 |
| 8 | B68 | 13 | 4 | - | 2 | - | 7 | 9 | 19 | -10 | 14 |
| 9 | Skála | 13 | 2 | - | 5 | - | 6 | 10 | 20 | -10 | 11 |
| 10 | B71 | 13 | 2 | - | 2 | - | 9 | 13 | 26 | -13 | 8 |

**1. deild**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB/S | 14 | 11 | - | 1 | - | 2 | 35 | 10 | 25 | 34 |
| 2 | 07 Vestur | 13 | 10 | - | 1 | - | 2 | 57 | 20 | 37 | 31 |
| 3 | TB | 15 | 9 | - | 2 | - | 4 | 42 | 12 | 30 | 29 |
| 4 | AB | 13 | 9 | - | 1 | - | 3 | 45 | 17 | 28 | 28 |
| 5 | HB | 13 | 4 | - | 4 | - | 5 | 20 | 14 | 6 | 16 |
| 6 | Víkingur | 13 | 4 | - | 3 | - | 6 | 17 | 34 | -17 | 15 |
| 7 | KÍ | 12 | 4 | - | 1 | - | 7 | 18 | 39 | -21 | 13 |
| 8 | NSÍ | 14 | 2 | - | 4 | - | 8 | 24 | 43 | -19 | 10 |
| 9 | EB/S | 14 | 3 | - | 0 | - | 11 | 13 | 60 | -47 | 9 |
| 10 | B68 | 13 | 2 | - | 1 | - | 10 | 16 | 38 | -22 | 7 |